# Á listaferð til New York

**Í morgun fóru 16 næmingar og tríggir lærarar úr Vágum á veg til New York á listanámsferð. Hetta er fyrstu ferð, at hendan verkætlan er roynd, og nógvar spennandi upplivingar bíða fyri framman hesa komandi vikuna**

Leo Poulsen

Tað eru tær tríggjar, Bjørg Djurhuus, Sigrið Højsted og Sólgerð Andreasen, ið hava tikið stig til hesa verkætlanina, sum í stuttum gongur út upp á at savna ung við listarligum áhuga og gávum.

Allar tríggjar hava havt myndlist sum linju á læraraskúlanum, og Bjørg Djurhuus hevur eitt tríára samstarv við listaskúlar í Aberdeen.

– Vit hava saknað eitt listarligt tilboð til ung, og tí tóku vit stig til hesa verkætlanina, sigur Bjørg Djurhuus.

Tey lýstu so við verkætlanini, og ung frá so at siga øllum landinum meldaðu seg til.

– Tíverri eru eingi úr Suðuroynni og Sandoynni við, men restin av landinum er umboðað, sigur Sigrið Højsted.

Undirvísingin byrjaði so í september, og gjøgnum veturin hava tey gjøgnumgingið eina røð av listagreinum og teknikkum. Tey hava arbeitt við leiri, oljukriti, akvarel og akryl á lørifti.

– Vit hava viðgjørt føroyskar listamálarar og teirra teknikkir, og vit hava havt tvær workshops, eina í Klaksvík og eina í Nólsoy, sigur Bjørg Djurhuus.

Tey hava hitst einaferð um mánaðin, og tað hevur verið alt frá leygardegi seinnapart til eitt heilt vikuskiftið, har tey hava ligið nátt saman. Fyri tað mesta hava tey hitst í Kommunuskúlanum, men eisini onkuntíð í Skúlanum við Løgmannabreyt.



*Hópurin avmyndaður á flogvøllinum í morgun, áðrenn leiðin gekk móti Reykjavík og síðani New York*

*Mynd: Eirikur Sundar Hansen*

## Tungt fíggjarliga

Av tí at ein slík verkætlan ikki hevur verið roynd áður, hevur tað verið sum at brotið burtur úr nýggjum.

– Tað hevur víst seg at verið ógvuliga tungt at savna pening til námsferðina. Vit hava brúkt ein ørgrynnu av tíð upp á hetta, og vit hava í hvussu er lært, at verður ein slík verkætlan gjørd aftur, skulu uppgávurnar deilast út á foreldrabólkar, sigur Sigrið Højsted.

Tey hava søkt um stuðul frá øllum hugsandi stovnum og fyritøkum, og tey hava verið hjá kommununi, men tey hava bert í fáum førum fingið svar, tiansheldur stuðul.

– Vit hava skipað fyri ymsum øðrum tiltøkum, so sum tombola og øðrum, og vit hava selt málningar, sum børnini hava málað, sigur Sigrið Højsted.

Tað er tí ein sera dýr verkætlan fyri foreldur og børn, men tað fíggjarliga er komið upp á pláss, og í morgun fóru so teir 16 spentu næmingarnir og teir tríggir lærararnir umborð á Atlantsflog á veg til Reykjavíkar og hagani víðari til New York.

## Nógvar upplivingar

Vitjað verður í listaliga metropolinum New York í eina viku. Men talan verður um eina spennandi viku.

Í skránni sæst, at mánadagurin fer við at ferðast. Flogið verður úr Vágum klokkan 11, og tey eru í Reykjavík 11.30 lokala tíð. So verður flogið víðari klokkan 17, og tey lenda so í New York klokkan 19. Her skal sjálvandi havast í huga, at New York er seks tímar aftan fyri okkum í Føroyum, og tí tykist tað so skjótt at flúgva.

Tann kanska mest spennandi dagurin kemur longu týsdagin, tá tey skulu vitja á heimskenda listasavninum, Guggenheim. Seinni um dagin vitja tey í Central Park.

Mikudagin vitja tey kenda býarpartin SoHo, áðrenn dagurin endar í Apollo Theatre, har nógvar heimskendar tónleikastjørnur eru funnar.

Hósdagurin bjóðar millum annað upp á ein túr í Empire State Building, einaferð heimsins hægsti bygningur, og vikuskiftið fer við lættari tiltøkum, har tey millum annað hyggja at Hudson River.

Sunnudagin skulu tey so uppliva eina serstaka amerikanska gudstænastu, áðrenn leiðin seinni um dagin aftur gongur móti Reykjavík og síðani Føroyum.

## Stór menning

Námsferðin til New York er rosinan í pylsuendanum hjá hesum 16 næmingunum, sum gjøgnum veturin hava lært um føroyskar listamálarar og ymsar teknikkir og mátar at mála upp á.

Upp undir ferðina til New York hava allir næmingarnir gjørt eina uppgávu, har teir valdu sær ein amerikanskan listamálara og lærdu seg um hann og hansara hátt at mála.

– Uppgávan gekk í stóran mun út upp á, at mála ein málning á sama hátt, sum amerikanski listamálarin hevði gjørt, sigur Bjørg Djurhuus.

Hon heldur, at tað er bæði stuttligt og fløvandi at síggja, hvussu næmingarnir hava ment seg gjøgnum veturin, og hvussu gott teir hava havt av at møtast.

– Tað gevur nakað heilt serligt, tá hesir næmingar hittast. Í gerandisdegnum kenna teir seg einsamallar við sínum serliga áhuga, og tí skapast ein serlig kemi, tá teir hittast, sigur Bjørg Djurhuus.

Hon heldur, at tað er hugvekjandi, so væl fleiri av næmingunum duga at tekna, og summir hava heilt framúrskarandi evnir.

– Vit hava í hvussu er ein næming, sum longu nú er sannførd um, at hon vil verða listafólk, og vit tosa altso um 15 ára gamlar næmingar, sigur Bjørg Djurhuus.

Næmingarnir eru ógvuliga seriøsir og ganga høgt upp í verkætlanina, og tí ivast lærararnir ikki í, at tey fáa nógv burtur úr spennandi og áhugaverdu námsferðini til New York.



*Hópurin hevur savnað pengar inn við at skipa fyri tombola og listaframsýningum*

*Mynd: Sólgerð Andreasen*



*Tey hava hitst einaferð um mánaðin og hava lært ymsar teknikkir í sambandi við málningalist*

*Mynd: Sólgerð Andreasen*